# TAÐ ER TÍÐIN

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## Facebook gongur út yvir sjálvsálitið

Tá ið fólk leggja myndir av skíferðini í Fraklandi út á Facebook, ella checka inn á ein kenda matstovu uttanlands ella skriva dagføringar sum "eg baki køku saman við børnunum", so kann tað ganga út yvir sjálvsáltiið hjá teimum, sum síggja hetta. Summi fólk halda, at onnur liva meira spenanndi enn ein sjálvur, tá ið tey síggja slíkar dagføringar.

Videnskab.dk skrivar, at granskarar á Standford Universitetinum halda, at vit undimeta, hvussu onnur fólk hava tað, tá ið vit bara tosa um positiv ting á Facebook. Sambært granskarunum var tað ein greið ábending um, at fólk, sum síggja nógvar positivar dagføringar og myndir halda, at onnur hava tað betri enn ein sjálvur.

– Okkara dagføringar á Facebook snúgva seg í stóran mun um at skapa ein samleika og at fáa viðurkenning.Vit vilja heldur kennast fyri tað góða enn tað ringa. Hinvegin merkir tað, at fólk við lítlum sjálvsvirði fáa eina kenslu av, at hini hava tað nógv betur, sigur Lars Lundmann Jensen, lektari í sálarfrøði á Københavns Universitet, við videnskab.dk.

## Kristið par sleppur ikki at hava børn í pleygu

Stór mótstøða ímóti samkyndum hevur við sær, at eini hjún ikki sleppa at verða pleyguforeldur í Bretlandi. Tað hevur bretski hægstirættur gjørt av.

Eunice og Owen Johns eru partur av eini pinsakirkju í Derby, og tey bjóðaðu seg fram sum pleyguforeldur, tá ið sosialu myndugleikarnir søktu eftir pørum at taka børn í pleygu. Men parið varð noktað at fáa nakað barn í pleygu, og orsøkin var, at teirra sterka kristnað trúgv gjørdi, at tey vóru ímóti samkyndum. Málið endaði í rættinum, og felagsskapurin Christian Legal Centre hjálpti parinum í Derby. Men mánadagin gjørdi hægsti rættur í Bretlandi sína niðurstøðu, og hon var, at »lógin ímóti diskriminatión av samkyndum telir meira enn rætturin til ikki at verða diskrimineraður av átrúnaðarligum orsøkum.« Harvið fingu sosialu myndugleikarnir í Derby viðhald í síni niðurstøðu.



## Vín uttan høvuðpínu

Ein granskari, sum sjálv fær ilt í høvdið av víni, hevur ment eitt nýtt gerslag, sum kann minka um innihaldi av aminum í reyðvíni. Aminur eru tey evni, sum kunnu geva fólki høvuðpínu og høgt blóðtrýst. Hennie van Vuuren, sum er granskari á University of British Columbia í Kanada, hevur í 15 ára granskað í gerinum, sum nú er góðkent í USA, Kanada og Suðurafrika. Í løtuni er gerið til kanningar í Europa.



## Metsøla av nasaspreyi

Nasasprey selur betur enn nakrantíð áður. Í øllum førum í Danmark, har 2,3 milliónir smáar eindir av nasaspreyi vóru seldar í fjør. Hetta er største mongd, sum er máld, síðani Apotekarafelagið fór at gera yvirlit yvir søluna fyri 15 árum síðani. Ein orsøk til, at sølan er so nógv vaksin skal vera, at í 2001 gjørdist tað lógligt at selja nasasprey í kioskum og øðrum handlum, og síðani tá er sølan vaksin við 37 prosentum.

Ein farmaceutur í Apotekarfelagnum ávarar tó ímóti at brúka ov nógv nasasprey.

– Tá tú ert forkølaður, hovnar slímhindin í nøsuni. Brúkar tú nasasprey, so fellir slímhindin aftur, so tú betur fært anda. Men brúkar tú nasaspreyið ov ofta og ov nógv, hendir tað mótsatta, nevniliga at slímhindin hovnar, og tað er ein trupulleiki, sum kann verða ringur at sleppa av við aftur, sigur Helle Jacobsgaard við Politiken.



## Roxette-stjørna er frísk

Einaferð fekk hon boðini, at hon hevði eitt hálvt ár eftir at liva í. Men nú er hon frísk av krabbameinssjúku, sum plágaði hana í fleiri ár. Svenska songkvinnan Marie Fredriksson, sum gjørdist heimskend sum sangari í bólkinum Roxette, hevur verið nógv ígjøgnum, men nú er hon til reiðar til comeback í Roxette, har hon er í front saman við Per Gessle. Í næstum skulu tey spæla eina konsert í Russlandi og roknað verður við, at tey fara at spæla nógv live komandi tíðina.




## Lego í bakandi sól

Lego-klossarnir hava tað gott, og danska Lego-fyritøkan er nú farið at byggja eitt Legoland har suðuri í Malaysia. Legolandið í Malaysia er tað fyrsta í Fjareystri og tað sætta í heiminum. Frammanunda hevur Lego bygt temaparkir í Billund, Bretlandi, Kalifornia, Florida og í Týsklandi. Nýggja Legolandið verður í tropiskum veðurlagi og skal standa liðugt næsta ár.